# Kunning og vegleiðing til limafeløgini í Føroya Ungdómsráð (FUR) viðvíkjandi viðgerð av persónupplýsingum

*Seinast dagført tann 24. februar 2021*

**Innleiðing:**

Limafeløgini í FUR hava í fleiri ár verið undirløgd reglum í lógini um viðgerð av persónupplýsingum, men tann 1. januar 2021 kom nýggj Dátuverndarlóg í gildi. Hendan vegleiðing er gjørd fyri at upplýsa feløgunum um tey krøv, sum eru við viðgerð av persónupplýsingum.

Ásetingarnar í Dátuverndarlógini eru generellar og eru galdandi fyri øll – teimum minstu fríðtíðarfeløgunum, størri fyritøkum og almennum myndugleikum.

Ætlanin við vegleiðingini er at geva ítøkiligar metingar av týdninginum av reglunum fyri limafeløgini innan útvald økir, sum mett verður er mest viðkomandi, ásannandi at ein vegleiðing ikki kann geva svar uppá alt.

**Innihald:**

| | |
|---|---|
| Viðgerð av persónupplýsingum í feløgum | s. 3 |
| Hvat er ein persónupplýsingur? | s. 3 |
| Felagið er dátuábyrgdari | s. 4 |
| Meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum | s. 4 |
| Viðgerð av persónupplýsingum í frítíðarfeløgum | s. 5 |
| Yvirlit yvir viðgerðir (krav um skjalprógv) | s. 6 |
| Rættindi hjá skrásetta | s. 6 |
| Brot á trygdina | s. 6 |
| Fylgiskjøl | s. 6 |

**Viðgerð av persónupplýsingum í feløgum:**

Ein viðgerð er í lógini lýst sum *øll nýtsla, so sum savnan, skráseting, samkoyring, goyming, víðarigeving, avhending o.a. ella ein sameining av hesum, líkamikið um henda er automatisk ella ei.*

Yvirskipað sæð eru 4 høvuðskrøv at fyrihalda seg til:

1. Tit skulu hava eitt sakligt endamál við at viðgera persónupplýsingar og avmarka viðgerðina til tað sum er neyðugt í mun til tað sakliga endamálið.
2. Tit skulu skjalprógva, at tit hava yvirlit yvir tykkara viðgerðir av persónupplýsingum, tvs. hvørjar persónupplýsingar tit viðgera, hvør viðger hesar, hvar verða persónupplýsingarnar goymdir osv. Hetta kann lýsast í einum yvirliti yvir viðgerðir.
3. Tit skulu kunnað tann skrásetta (limir, leiðarar osv.) um hvørjir persónupplýsingar blíva viðgjørdir og hví. Hetta kann gerast í einum Privatlívspolitikki.
4. Tit skulu hava eina passandi dátutrygd, og tit skulu í summum førum fráboða brot á trygdina til Dátueftirlitið.

Umráðandi er at gera sær nakrar hugsanir um omanfyristandandi og út frá tí taka neyðugar avgerðir, har tit yvirfyri Dátueftirlitinum kunnu skjalprógva tykkara metingar. Rætta loysnin kann variera frá felag til felag, tí finst ikki altíð ein røtt loysn, tí er umráðandi at meta um viðurskiftini og taka skilagóðar avgerðir.

Fyri nevndarlimir, leiðarar osv. er eisini vert at taka við, at tað ikki altíð blíva sett somu krøv til fríðtíðarfeløg sum t.d. til eina stóra fyritøku, ein almennan myndugleika osv. Tí skulu tit vera vitandi um, at tað tit møguliga møta aðrastaðni, t.d. á tykkara dagliga arbeiði, ikki neyðturviliga skal viðgerast eins í einum frítíðarfelagið.

**Hvat er ein persónupplýsingur?**

Í Dátuverndarlógini er hetta lýst sum *ein og hvør upplýsing og meting, sum er knýtt ella kann knýtast at einum ávísum likamligum persóni, t.e. tann skrásetti.*

Tað kann t.d. vera navn, bústaður, telefonnummar. Lýsingin fevnur t.d. eisini um upplýsingar um luttøku í tiltøkum, legum osv. Upplýsingar um løgfrøðiligar persónar eru ikki fevndir.

Persónupplýsingar verða fevndir av reglunum, har teir verða viðgjørdir digitalt, men eru eisini galdandi um teir verða viðgjørdir á vanligum papíri, tá teir eru partir av einari skrá, t.d. limaskrá.

Persónupplýsingar kunnu grovt sagt býtast í tveir bólkar, sum eru 1) vanligir persónupplýsingar, sum allarhelst teir flestu upplýsingarnir tit viðgera hoyra undir og 2) upplýsingar sum krevja eina betri vernd, t.d. viðgerð av p-talinum og viðgerð av viðkvæmum persónupplýsingum, undir hesum t.d. upplýsingar um heilsustøðu, revsiverd viðurskifti, politiska og átrúnaðarliga sannføring osv.

**Felagið er dátuábyrgdari:**

Øll feløg viðgera persónupplýsingar, t.d. um egnar limir, leiðarar, nevndarfólk osv.

So skjótt tit viðgera persónupplýsingar um onnur eru tit dátuábyrgdarar, t.d. longu tá tit sum felag gera ein limalista, og longu tá er felagið fevnt av lógini.

Í einari nevnd vil tað vera skilagott at gera greitt hvør hevur tí praktisku uppgávuna at halda skil á persóndátuverndini í felagnum. Tað kann t.d. vera ein ella fleiri persónar.

**Meginreglur fyri viðgerð av persónupplýsingum:**

Persónupplýsingar skulu:

1) Viðgerast lógliga, rímiliga og á ein gjøgnumskygdan hátt í mun til tann skrásetta.
2) Savnast til nágreiniliga tilskilað og heimilað endamál og skulu ikki seinni viðgerast á ein hátt, sum er í ósamsvari við hesi endamál.
    a. *Skráseting av vanligum persónupplýsingum vil oftast tæna einum sakligum endamáli.*
    b. *Hinvegin er tað allarhelst ikki sakligt at skráseta upplýsingar um størv hjá limum ella teirra limaskap í øðrum felagsskapum. Undantøk kunnu sjálvandi vera.*
3) Vera nøktandi, viðkomandi og avmarkaðar til tað, sum er neyðugt til tey endamál, sum tær verða viðgjørdar til.
    a. *Hugsa t.d. um tað t.d. neyðugt at skráseta P-talið hjá vanligum limum.*
    b. *Hjá fólki sum skulu hava løn vil P-talið tó vera neyðugt.*
4) Vera rættar og nøktandi dagførdar.
5) Goymast soleiðis, at ikki ber til at eyðmerkja tey skrásettu í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.
6) Viðgerast á ein hátt, sum tryggjar nøktandi trygd av persónupplýsingum, undir hesum vernd ímóti óheimilaðari ella ólógligari viðgerð og ímóti missi av tilvild, fyribeining ella skaða, við nýtslu av hóskandi tøkniligum ella bygnaðarligum, herundir fysiskum, tiltøkum.
    a. *Tað finnast fleiri sløg av viðgerðarheimildum, men í flestu førum fyri eitt frítíðarfelag vil talan vera um at røkja eitt heimilað áhugamál hjá felagnum.*
    b. *Talan kann eisini vera um, at viðgerðin er neyðug fyri at halda eina avtalu við skrásetta*
    c. *Tað kann í summum førum eisini vera, at talan er um lógarkrav, t.d. við flyting av lønum*
    d. *Í sambandi við viðgerum av persónupplýsingum um heilsustøðu og líknandi vil tað tó vera neyðugt við samtykki. Finst onnur heimild enn samtykki, so brúka heldur ta heimildini, tí samtykki viðførur eyka krøv og eyka umsitingararbeiði.*

**Viðgerð av persónupplýsingum í frítíðarfeløgum:**

Tá eitt frítíðarfelag viðgerð persónupplýsingar eru tað fimm týðandi spurningar sum skulu umhugsast:

1. *Hvørjar upplýsingar kunnu vit skráseta og goyma vm.?*

Sum frítíðarfelag er neyðugt at hava yvirlit yvir tykkara limir. Persónupplýsingar sum eitt frítíðarfelag vanliga skrásetur um sínar limir vilja sum oftast vera sonevndir vanligir upplýsingar, t.d. navn, bústað, telefonnummar, føðidato, teldupostbústað, álitispostar í felagnum osv.

Hesar upplýsingar kann felagið skráseta, tí talan er um sonevnt heimilað áhugamál hjá felagnum, sum vigar meira enn møgulig atlit til skrásetta.

Hinvegin tá talan er um upplýsingar um heilsustøðu ella aðrar viðkvæmar persónupplýsingar, sum t.d. politiska, átrúnaðarliga ella heimspekiliga sannføring, skal samtykki í allarflestu førum og sum ein grundleggjandi høvuðsregla fyriliggja.

Eitt undantak til hetta er at finna í § 12, stk. 1, nr. 5 í Dátuverndarlógini sum gevur loyvi at viðgera viðkvæmar upplýsingar um viðgerðin verður framd av almannagagnligum felagi ella grunni, sum ikki virkar við vinningi fyri eyga, og hvørs endamál er av politiskum, heimspekiligum, átrúnaðarligum ella yrkisfelagsligum slagi, sum liður í heimilaðum virksemi og við hóskandi trygd, og treytað av, at viðgerðin einans viðvíkur limum, fyrrverandi limum ella persónum, sum við sama endamáli javnan eru í sambandi við hesi, og at persónupplýsingarnar ikki verða víðarigivnar uttan samtykki frá tí skrásetta.

Allir persónupplýsingar skulu strikast tá teir ikki longur eru neyðugir fyri felagið.

2. *Hvat skulu vit upplýsa fyri okkara limum, tá vit skráseta upplýsingar um tey? Hvat merkir upplýsingarskylda og privatlívspolitikkur?*

Limir og sjálvboðin skulu upplýsast um, hvat endamálið hjá felagnum er við viðgerðini av persónupplýsingum um tey og hvussu leingi hesar upplýsingar verða goymdir. Hendan kunningin skal gevast frá tí at viðgerðin byrjar. Her ber t.d. til at vísa til ein privatlívspolitik, sum skal vera tøkur fyri limir, leiðarar osv., t.d. á heimasíðu felagsins. Hesin kann t.d. eisini útflýggjast á pappíri. Sí fylgiskjal 1.

3. *Hvat kunnu vit gera við upplýsingar um okkara limir?*

Upplýsingarnir mugu bert nýtast í samsvari við tað endamálið, sum upplýsingarnir blivu innheintaðir til.

Um felagið ynskir at víðarigeva øðrum uttanfyri felagið persónupplýsingar um limir, so vil tað sum oftast krevja at samtykki fyriliggur. Hetta kann eisini umtalast í privatlívspolitikkinum.

4. *Hvat kunnu vit gera við upplýsingar um leiðarar og sjálvboðin?*

Tá tað kemur til viðgerð av persónupplýsingum um leiðarar og sjálvboðin, so vil tað í fleiri førum vera tørvur á at viðgera persónupplýsingar, sum krevja hægri vernd, t.d. p-talið ísv. lønarflytingar.

Um felagið ynskir at víðarigeva øðrum uttanfyri felagið persónupplýsingar um leiðarar og sjálvboðin, so vil tað sum oftast eisini her krevja at samtykki fyriliggur. Hetta kann eisini umtalast í privatlívspolitikkinum.

5. *Hvørji krøv eru til dátutrygd og skjalprógv?*

Feløgini skulu syrgja fyri, at viðgerðin av persónupplýsing fer fram undir passandi trygd. Tað vil siga, at tað bert má vera atgongd til upplýsingarnar fyri leiðsluna í felagnum (nevndarlimir, leiðarar osv.), og at kt-trygdin skal vera nøktandi við m.a. brúk av tryggum loyniorðum og firewall.

Við cloud-grundaðum loysnum skal cloud-veitarin garantera fyri trygdini í dátuviðgeraravtaluni við felagið. Felagið skal meta um trygdin er nøktandi.

*Uttanhýsis dátuviðgerar*

Brúka tit uttanhýsis hjálp til at viðgera tykkara persónupplýsingar, so eru hesir uttanhýsis partar dátuviðgerar, tvs. ein sum viðgerð upplýsingarnar tykkara vegna. Her krevst dátuviðgeraravtala millum felagið og dátuviðgeran. Flestu dátuviðgerar hava standardavtalur til hetta. Dátueftirlitið hevur eisini eina skabelón til dátuviðgeraravtalur tøka.

*Felags dátuábyrgd*

Um fleiri feløg eru felags um at viðgera persónupplýsingar, hava tey eina felags ábyrgd av viðgerðini. T.d. í sambandi við fyriskipan av felags tiltøkum, legum osv.

Í tílíkum førum skulu hesi feløg gera eina felags dátuábyrgdaravtalu, sum ásetur endamálini við viðgerini og ábyrgdarbýti.

**Yvirlit yvir viðgerðir (krav um skjalprógv)**

Við yvirlitsskylduni meinast, at felagið skal skjalprógva, hvussu persónupplýsingarnir blíva viðgjørdir.

Ein og hvør dátuábyrgdari skal hava eitt innanhýsis yvirlit yvir hvørjar persónupplýsingar vera viðgjørdir, hví teir blíva viðgjørdir og hvør hevur atgongd.

Dátuábyrgdarin skal tryggja sær, at tað er skil á tingunum og skal kunna skjalprógva, at tað veruliga er so.

Sí fylgiskjal 2, sum er ein skabelón sum feløgini kunnu brúka til at gera yvirlitið.

Minst til at viðlíkahalda yvirlitið leypandi.

Feløgini kunnu umhugsa at gera ein instruks til leiðarar og onnur, sum viðgera persónupplýsingar í felagnum, har tað verður ásett hvørji viðurskifti og krøv hesir persónar skulu vera serliga uppmerksamir uppá bæði áðrenn, meðan og eftir teirra virki í felagnum. Hetta kann vera við til at tryggja, at felagið í praksis livir upp til tær leiðreglur, sum felagið sjálvt ásetur í privatlívspolitikkinum og yvirlitinum yvir viðgerðir.

**Rættindi hjá skrásetta:**

Tann skrásetti hevur eina røð av rættindum, t.d. rætt til innlit í upplýsingar um seg, rætt til at fáa upplýsingar rættaðar, rætt til at fáa upplýsingar strikaðar osv. Dátueftirlitið hevur nærri vegleiðingar á síni heimasíðu hesum viðvíkjandi.

**Brot á dátutrygdina:**

Um tit sum dátuábyrgdari av óvart koma til at leka upplýsingar, fáa innbrot av teldusníkum ella á annan hátt uppliva brot á dátutrygdina, skulu tit í ávísum førum fráboða hetta til Dátueftirlitið (í útgangsstøðinum innan 72 tímar eftir at tit hava varnast brotið).

F**ylgiskjøl:**

1. Privatlívspolitikkur (skabelón)
2. Yvirlit yvir viðgerðir (skabelón)